# Magnus Heinason - Túrfrágreiðing
# Svartkalvi. Túrur nr. 1022.
# Tíðarskeið avsett til túrin: 9/6-16/6 – 2010.

---

**Fólk við frá Havstovuni:** Rógvi Mouritsen, Petur Steingrund og Jens Arni Thomassen.

**Ábyrgd:** Petur Steingrund (kanningarleiðari).

**Endamál:** Høvuðsendamálið við túrinum var at kanna svartkalva: Nøgd, longd, vekt, aldur, kyn og kynsbúning. Umframt skuldu kanningar eisini gerast av øðrum fiskasløgum, sum vóru fingin.
Eisini var hitin við botn skrásettur. Illicium varð tikið av havtasku.

**Reiðskapur:** Stjørnutrol við 135 mm posa, rockhopper grunnur, breitlar 120 m og Thyborøn-lemmar. Trolað varð í 4 tímar.

**Um túrin:**
Fóru av Havnini 9/6 kl. 21. Vit byrjaðu vestan fyri Suðuroynna og høvdu eitt hál har. Á øðrum hálinum kom hol a eitt hydraulikkrør á fabrikkini, og túrurin mátti tí brótast av 10/6. Harvið mátti staðfestast, at tíðarserian, sum gongur heilt aftur til 1995, var brotin, tí rannsóknarskipið var í so vánaligum standi. Myndugleikarnir eiga at gera sær greitt, at tað við hesum lag bara er ein tíðarspurningur til tíðarseriurnar (yvirlitstrolingarnar í mars og august), sum verða brúktar til stovnsmetingarnar av toski og hýsu, eisini koma at verða brotnar. Tá er ógjørligt at gera neyvar stovnsmetingar av toski og hýsu á sama hátt sum nú – og tað er eisini ein óheppin háttur at gera seg kendar uppá úti í heimi.

**Prøvatøka:** Veiðan varð viðgjørd sambært kanningarætlanini og sýnishondbókini.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Túrurin var liðugt rættaður 21. juni.

**Fyribilsúrslit:** Úrslitini frá hesi einu støðini eru í stuttum hesi: Samlaða veiðan var 259 kg: 63 kg av trantkongafiski, 37 kg av svartkalva, 34 kg av brosmu, 30 kg av blálongu, 29 kg av stóra kongafiski, og 24 kg av havtasku. Vit fingu eisini smáar nøgdir av agnhøgguslokki, gulllaksi og hvítuskøtu umframt onnur fiskasløg. 11 nytrur vórðu tiknar av svartkalva og 3 illicium av havtasku.

**Viðmerkingar:** Viðmerkingar til túrin eru skrivaðar í Tur1022d.doc.

Petur Steingrund